

BORIPALLUR

*Boripallurin West Phoenix, sum nú fer av aftur landgrunninum*

**Johan Dahl:**

# Staðfesting av kolvetnum lovandi

**ANNE MARIEBRUNNURIN** -Staðfestingin av kolvetnum er lovandi, og eg vænti, at hetta fer at økja um áhugan fyri oljuleiting í føroyska økinum enn meira sigur Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum um fyribils úrslitið av Anne Marie boringini

Jan Müller

Landsstýrismaðurin heldur eisini, at við hesum úrslitunum og í minsta lagi tveimum leitibrunnum, sum verða boraðir í øðrum leitiloyvum komandi tvey - trý árini, sær framtíðin spennandi út.

Leitibrunnurin 6004/8a-1 í loyvisøki 005 varð liðugt boraður nú um dagarnar. Brunnurin varð boraður á 1.106 metra havdýpi og rakk 3.901 metrar undir sjóvarmálan. Tað var boripallurin West Phoenix, ið boraði brunnin.

Feløgini í leitingarloyvi 005 eru ENI Denmark B.V., ið er fyristøðufelag, Cieco E & P (Faroe) Limited, Dana Petroleum (E & P) Limited, First Oil Expro Limited, Føroya Kolvetni P/F og OMV (Faroe Islands) Exploration GmbH.

Jarðfeingi sigur í tíðindaskrivi, at kolvetni vórðu funnin í tunnum sandløgum millum tjúkkari gosgrýtisfláir. Framhaldandi kanningar eru neyðugar til tess at meta nærri um samlaðu kolvetnisnøgdirnar í loyvisøkinum.

Boringin gav nýggjar og virðismiklar jarðfrøðiligar upplýsingar og eina greiðari mynd av heildarvánunum fyri oljuleiting á leiðini kring loyvisøki 005.

Brunnurin verður nú tipturur og afturlatin, og fyristøðufelagið fer at greina úrslitini, áðrenn avgerð verður tikin um, hvussu farast skal víðari fram.

*jan@sosialurin.fo*



*Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum: -Anne Marie boringin fer at økja um áhugan fyri oljuleiting her*



*Graham Steward og Nils Sørensen, stjórar í Faroe Petroleum*

# Hava funnið kolvetni

**SJEYNDI BRUNNURIN** -Sjálvt um tað ikki vórðu funnin tjúkk kolvetnisberandi sandløg í Anne Marie brunnunum, gevur úrslitið okkum áræði at halda á við leitivirksemi á loyvinum sigur Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum

Jan Müller

Faroe Petroleu sigur í tíðindaskrivi, at byrjað varð at bora á Anne Marie leitimiðinum tann 23. juli 2010, góðar 105 fjórðingar í ein landsynning úr Akrabergi. Borað varð niður á 3.901 metra dýpi, íroknað eitt havdýpi uppá á 1.106 metrar. Komið varð niður á endaliga dýpið tann 25. oktober 2010. Kolvetni eru funnin í tunnum sandløgum, ið liggja spjætt í tjúkkum Paleoceniskum gosgrýti. Hetta eru sterk prógv um eina virkna kolvetnisskipan á økinum. Fleiri kanningar av úrslitinum vera nú gjørdar fyri at staðfesta nøgd og eginleikar av fundinum sigur Faroe Petroleum í sínum tíðindaskrivi.

Norski boripallurin West Phoenix er í ferð við at rigga av, og fer væntandi av økinum ein av komandi døgunum. Í samtakinum eru Eni, ið er fyristøðufelag við 25%, OMV við 20%, Cieco við 12,5%, First Oil Expro við 5% og Faroe Petroleum (Føroya Kolvetni) við 12,5%.

**Lagavulin**

Faroe Petroleum borar so eisini hinumegin markið, á tí sokallaða Lagavulin loyvinum. Felagið sigur, at byrjað varð at bora Lagavulin leitibrunnin (Faroe 10%) á Atlantsmótinum vestan fyri Hetlandsoyggjarnar fyrr í oktober mánaða. Chevron er fyristøðufelag, og Stena Carron boriskipið, borar brunnin einar 230 kilometrar í ein landnyrðing úr Rosebank/Lochnagar fundinum, har Chevron eisini er fyristøðufelag. Í Lagavulin brunninum eru fleiri møguligar oljuberandi jarðgoymslur. Lagavulin leitibrunnurin, ið liggur á teigunum 217/10, 210/14 og 15, hevur møguligt kolvetnistilfeingi uppá meiri enn 500 mió tunnir. Sostatt er Lagavulin ein av teimum størstu óboraðu strukturunum á Atlantsmótinum. Tað tekur væntandi 120 dagar at bora brunnin.

-Okkara borivirksemi heldur fram við Lagavulin boringini, og fleiri aðrir brunnar eru fastlagdir tey næstu tvey árini á okkara loyvisportifølju, sum telur yvir 40 loyvi, aftaná at felagið í síðstu viku fekk tillutað fýra nýggj leitiloyvi í 26. útbjóðingarumfar í Bretlandi, sigur Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum.

*jan@sosialurin.fo*